


Lesið eisini ÍtróttaSosialin á alnetinum:
www.sosialurin.fo

# Landskappingin byrjað

*Flogbóltskappingin byrjaði um vikuskiftið. Í meistaradeildini verður leikt dupultumfar, t.e. at eitt umfar er fyri jól og eitt eftir jól. Stigini verða koyrd í helvt eftir jól*

Seinasta kappingarár var ikki so spennandi, tí hjá kvinnunum var Mjølnir einaráðandi, og hjá monnunum var tað Fleyr, sum vant burtur úr hinum liðunum.

*Ikki minst verður roknað við, at kvinnurnar hjá Drátti fara at økja um spenningin í ár*

**Meira spenningur**
Hetta kappingarárið sær út til at gerast meiri spennandi enn seinasta, tí hjá kvinnunum tapti Mjølnir seinasta vikuskifti fyri Drátti í FK-kappingini, sum Fleyr skipaði fyri. Hjá monnunum hevur Fleyr mist nógv fólk, og tó at ungir og dugnaligir menn hava tikið við, so er liðið viknað.

**Nýggj teljiskipan – enn einaferð**
Seinasta kappingarár varð nýggj teljiskipan roynd í landskappingini. Leikt varð í tveimum hálvleikum. Tvey sett vóru í hvørjum hálvleiki, hvørt settið upp í 21. Hetta var felags skipan fyri øll norðurlond, men av tí at sviar avgjørdu at fara frá hesi skipanini, so gjørdu hini norðurlondini tað sama.

FIVB, altjóða flogbóltssambandið, hevði givið loyvi til hesa royndarskipanina og ætlanin var eisini, at hon skuldi halda fram eini tvey ár afturat og so leggjast fram fyri hini limalondini í FIVB. Hetta verður nú av ongum.

Skipanin, sum nú verður brúkt um allan heim, og tí eisini í Føroyum, er lík teirri góðu gomlu. Leikt verður um 5 sett. 4 tey fyrstu settini eru upp í 25, og 5. sett er upp í 15. Minst 2 stig skulu vera á muni í hvørjum setti. Spælt verður ikki um servuna, tí hvør bóltur telur. So er bara at vóna, at hesi skipanini verður longri lív lagað enn teirri gomlu.



# Ilic beiggjarnir gjørdu um seg

*Flogbóltur, menn: Jugoslaviski venjarin hjá Mjølni var ein hin týdningarmesti spælarin undanfarna kappingarár, og í ár er eisini beiggi hansara at síggja í Føroyum. Hann spælir við ÍF*

MAGNUS TAUSEN

ÍF — Mjølnir 1 — 3 1 7 - 25, 19-25, 25-23, 25-27

Mjølnir hevur í ár sera sterkt lið. Manningin er tann sama sum seinasta kappingarár, og tá vann liðið silvur. Í ár er so eisini Rúni Elltør farin aftur at spæla, og tað styrkir um. Borko Ilic er komin aftur úr Jugoslavia at venja klaksvíkingar, og hann var avgjørt besti leikari seinasta kappingarár. Tí verður hildið, at Mjølnir er gullfavorittur hetta kappingarárið.

**Gamlir kenningar**
Hjá ÍF er nógv broytt síðan liðið vann gull í 1999. Fleiri av leikarunum, sum tá vóru við eru givnir, men gomlu stuðlarnir Bjarni, Kenneth og Bartal eru við aftur í ár, og ÍF hevur umframt hesar frálíku leikararnar eisini fingið fatur á útlendskum venjara. Talan er um Boban Ilic, sum er beiggi Borko Ilic. Boban skal venja flestu liðini hjá ÍF og spæla við meistaradeildarliðnum

**Dystargongdin**
Nógvir og spennandi dystir hava verið millum ÍF og Mjølnir, og ofta hevur tað verið ÍF, sum hevur drigið longra stráið, og serliga á Kambsdali. Fyrsti dysturin hetta kappingarárið var so millum hesi liðini, og sum altíð gjørdist hann javnur og spennandi.

Mjølnir legði harðliga fyri, og í 1. og 2. setti var eingin ivi um, hvat lið var betri. Mjølnir spældi trygt, og Borko avgjørdi nógvar bóltar frammi við netið. Spælið var kanska ikki so flott, men nóg mikið til at vinna á ÍF. Í hesum fyrstu settunum var tað sum um, at ÍF leikararnir ikki høvdu spælt saman fyrr. Nógvar misskiljingar vóru, og tað darvaði spælinum. So við og við gjørdist hetta tó betur, og Boban gjørdi alt meira um seg, og gomlu dygdirnar hjá ÍF komu til sjóndar.

Í 3. setti var ÍF rættiliga komið fyri seg, og nú tóktist alt púra javnt. Álopsspælið gekk væl, og uppsamlingarnar aftanfyri vóru, sum altíð, sera góðar. ÍF vann hetta settið, og dysturin var um at venda.

Í 4. setti fann Mjølnir góða spælið fram aftur og helt seg frammanfyri heilt upp í 24-17. Sostatt manglaið bara 1 stig í at vinna dystin, men nú stóð fast. ÍF gevst ikki so, og teir megnaðu eisini at koma við í dystin aftur. ÍF vann 8 stig á rað, og støðan gjørdist 25-24. Mjølnir tóktist at standa í stað, men til endans vístu teir tó styrkina, og vunnu settið 27-25.

**Brøðurnir**
Stóru spælararnir vóru Ilic beiggjarnir. Teir eru sera góðir frammi við netið, og vinna mestsum alt teir fáa at arbeiða við. Boban hjá ÍF tykist kanska ikki at vera í topp venjing, men hann dugir at spæla flogbólt, og verður helst tungur at syfta seinni í kappingarárinum.

Besti leikarin í dystinum var Borko Ilic hjá Mjølni, og alt bendir á, at Mjølnir fer at koma langt hetta kappingarárið.

# Fleyr mátti stríðast

*Flogbóltur, menn: Tað gjørdist eins torført, sum havnarmenninir vóru bangnir um, tá teir leygardagin royndu seg í Sørvági*

MAGNUS TAUSEN

SÍ – Fleyr 1 – 3

Føroyameistararnir í Fleyr byrjaðu kappingarárið í Sørvági. At spæla í Sørvági er ongantíð lætt, tí SÍ er sera sterkt lið á heimavølli. Eisini er Fleyrliðið broytt nakað, borið saman við seinasta kappingarár. Klæmint Isaksen venur Fleyr í ár, og aftur at sær hevur hann góðar menn. Tummas Óli Mortensen spælir framvegis, og ein leikari, sum rættiliga ger vart við seg, er Steinar Eirikstoft. Steinar er ungur, men var ein av bestu monnunum á Fleyrliðnum, sum vann alt seinasta kappingarár.

**Ungt lið**
SÍ er mannað við ungum leikarum, sum seinastu árini hava vunnið ungdómsdeildirnar. Í ár spælir Sune Hansen eisini við. Hann er mest kendur úr ÍF, og hevur drúgvar royndir í flogbólti. Henda samansetingin fer óiva at geva hinum liðunum onkran hvøkk, í Sørvági í hvussu er.

**Byrjaðu sannførandi**
Dysturin byrjaði annars sera væl hjá Fleyr. Góðu servurnar vóru nokk til, at SÍ als ikki var við í dystinum tvey tey fyrstu settini. Móttøkurnar komu ikki fram til hevaran, og tá nyttar lítið, at SÍ hevur Jón Nielsen sum smashara. Jón fekk alt ov fáar bóltar at arbeiða við, og Fleyr streyk avstað.

Broyting mátti tí koma í, og í 3. setti kom SÍ fyri seg. Lætta byrjanin hevði kanska gjørt, at Fleyr varð dovnað nakað. SÍ tók sær um reiggj, og vann hetta settið greitt. Móttøkan kom væl upp, og tí riggaði álopsspælið eisini.

**Hart móti endanum**
Í 4. setti byrjaði dysturin av álvara. Fleyr sá nú, at her fór ikki at vera so lætt at vinna kortini, og teir spentu seg tí út. SÍ helt á við góða spælinum, og teir vóru væl frammanfyri upp í 20, men tá fór Fleyr at nærkast. Tummas Óli kom inn, og tað gav Fleyr neyðugu trygdina. SÍ vildi tó ikki gevast so, og teir høvdu eisini settbólt, men endin var, at Fleyr vann settið 27-25 og dystin 3-1.

Sum so ofta fyrr hjá SÍ manglaði bara tað síðsta, men hini liðini eru nú ávarað. Eingin vinnur lættliga í Sørvági.

**Støðan, meistaradeild kvinnur**

| | d | v | | t | Vunnin sett | Tapt sett | Sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Dráttur | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 2 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 3 TB | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 0 | 3 | 2 |
| 4 Fleyr | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 5 ÍF | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |
| 6 Fossánes | 1 | 0 | - | 1 | 0 | 3 | -3 | 0 |

**Støðan, meistaradeild menn**

| | d | v | | t | Vunnin sett | Tapt sett | Sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 2 Fleyr | 1 | 1 | - | 0 | 3 | 1 | 2 | 2 |
| 3 Fram | 0 | 0 | - | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| 4 SÍ | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |
| 5 ÍF | 1 | 0 | - | 1 | 1 | 3 | -2 | 0 |



# Dráttur vann lættliga

*Flogbóltur, kvinnur: Nýggi venjarin hjá Drátti er avgjørt ein styrkur fyri liðið*

MAGNUS TAUSEN

Dráttur – Fleyr 3 – 0
25-17, 25-22, 25-12

Dráttur hevur rættiliga brynjað seg til hetta kappingarárið. Nú skal tað vera, at Dráttur verður føroyameistari. Manningin er nógv tann sama sum seinasta kappingarár, men stóri munurin er *Marina Popovic*. Marina er venjari hjá Drátti, og hon spælir eisini við. Hon er 21 ára gomul og kemur úr Bosnia. At hon hevur spælt við góðum fólki sæst skjótt, tí hon roynist sera væl. Slær hart og væl, men dugir eisini væl at fylgja við, hvar best er at sláa, og hon dugir væl at stýra spælinum.

**Stórur munur**
Fleyr, sum seinastu kappingarárini ikki hevur fingið tað heilt stóra burturúr, byrjaði hetta kappingarárið illa. Liðið kom ongantíð rættiliga fyri seg í dystinum ímóti Drátti, og skilligt er, at nógv má til, áðrenn hetta Fleyrliðið er við í oddastríðnum. Her skal tó havast í huga, at hetta var fyrsti dysturin í kappingini, og tí er sjálvandi alt ov tíðliga at siga hvør fer at vinna og hvør ikki.

Dysturin var deydligur, og bæði liðini gjørdu nógv mistøk. Dráttur spældi rættiliga væl í 1. setti, men sum dystinum leið, viknaði spælið nakað. Fleyr var rættiliga væl við tvey tey fyrstu settini, og serliga í 2. setti stóðu tær seg væl. Eftir hetta var allur ivi um úrslitið burtur, tí Dráttur streyk avstað í 3. setti. Tær fingu 7 servur á rað beinanveg, hildu hesa leiðsluna og so var dysturin avgjørdur.

# Tungt hjá Fossanesi

*Flogbóltur, kvinnur: Uppflytararnir stóðu seg ikki móti TB, hóast tvørágenturnar ikki tykjast hava somu styrki sum í fjør*

MAGNUS TAUSEN

TB – Fossanes 3 – 0
25-18, 25-15, 25-20

Seinasti dysturin í meistaradeildini var millum TB og Fossanes. Fossanes er nýggja liðið í meistaradeildini hjá kvinnum. Tað er torført hjá nýggjum liðum at standa seg í kappingini í meistaradeildini, og so verður eisini hjá Fossanesi.

**Mist nógv**
Í TB er støðan ikki so góð, tí fleiri av leikarunum eru ikki við í ár. Dysturin var eisini merktur av, at bæði liðini eru ung. Villurnar vóru rættiliga nógvar, og sum heild var dysturin ikki nakað at reypa av. TB læt tó ongan iva vera um, at tær vóru betra liðið, men Fossanes varð ikki avbukað.

Venjari hjá Fossanesi er Jón Kári Frederiksen. Hann hevur drúgvar royndir í flogbólti. Leiakrarnir á liðnum hjá Fossanesi eru ungir, og tí er einki at ivast í, at nógv kann koma burtur úr samarbeiðnum. Hetta kappingarárið verður tó ógvuliga hart og helst ein bardagi um ikki at enda aftast.

# Lætt hjá Mjølnir

*Flogbóltur, kvinnur: ÍF fekk lítið og einki gjørt við meistaraliðið*

MAGNUS TAUSEN

ÍF – Mjølnir 0 – 3
11-25, 21-25, 21-25

Meistaraliðið úr Klaksvík hevur seinastu árini verið einaráðandi í føroyskum kvinnuflogbólti. Mjølnir hevur vunnið mestsum alt, og aftur í ár er liðið væl fyri.

**Sá lætt út**
Í dystinum ímóti ÍF gjørdu kvinnurnar í Mjølni ikki so nógv burturúr. Grundspælið er trygt, og tí ger liðið mestsum ongar villur. Á liðnum eru góðir smasharar, og Marjun Kalsø stýrir øllum væl.

Hjá ÍF var uppgávan tí ógvuliga torfør. Á liðnum eru somu leikarar sum seinasta kappingarár, men ov lítið hevur eftir øllum at døma verið vant, tí liðið er ikki samanspælt, og nógvar villur vórðu gjørdar í dystinum.

**Færri mistøk**
Í 1. setti riggaði als einki hjá ÍF, og Mjølnir skuldi mestsum einki gera fyri at vinna. Hetta var ein av teimum dystunum, sum ikki eru serliga áhugaverdir at hyggja at, tí ferðin var alt ov lítil. Tey bæði seinnu settini vóru nógv javnari, og liðini fylgdust upp í 20. Tá kom munurin á liðunum til sjóndar, tí nú gjørdi ÍF mistøk, men Mjølnir helt á.

Mjølnirkvinnurnar vístu ikki meistaraspæl, men tað var nú heldur ikki neyðugt. Aftur í ár er tað Mjølnir, øll hini liðini skulu royna at koppa. Tað megnaði Dráttur í FK-kappingini, og tí er vón hjá hinum liðunum eisini.

Spennandi verður at síggja hvussu fer at gangast, tá ið Dráttur og Mjølnir hittast fyrstu ferð. Tað verður longu nú leygardagin í Klaksvík. Nógv bendir á, at hesi liðini fara at togast um meistaraheitið.

# FK-kappingin

*Í farnu viku umrøddu vit FK-kappingina, sum Fleyr skipaði fyri. Vegna plásstrot var tá ikki rúmd fyri øllum liðmyndunum, og verða írestandi myndirnar ístaðin prentaðar nú*



*SÍ og sørvingar vunnu kappingina fyri 1. deild hjá monnum*



*Mannfólkini úr Mjølni vunu 2. deild*



*Vinnarar hjá 1. deild, kvinnum, gjørdust Fleyr*



*Aðru deild hjá kvinnunum vunnu KÍF*